Landssjúkrahúsið
100 Tórshavn

Yvirsjúkrasystir

Á psykiatrisku deild er starvið sum yvirsjúkrasystir leyst til setan 1. apríl 1996. Vísandi til møguligar bygnaðarbroytingar verður starvið í fyrstu atløgu bert sett fyri 1 ár.

Psykiatrisk deild hevur 64 seingjarpláss, býtt á 5 seingjardeildir. Eisini er 1 dagdeild og ambulant virksemi.

Á deildunum starvast sjúkrasystrar, pleygarar/sosial- og sunnheitsassistentar, sjúkrahjálparar og pedagogar. Sjúkrasystraútbúgving fer fram á deildunum.

Yvirsjúkrasystrastarvið er skipað beinleiðis undir fyristøðukvinnuni.

Yvirsjúkrasystirin hevur ábyrgdina av sjúkrarøktini á psykiatrisku deildunum, leiðsluni av røktarstarvsfólkunum og útvbúgvingini av sjúkrasystralesandi.

Krøv til umsøkjaran:

- viðariútbúgving frá DSH minst á S.D. stigi, ella samsvarandi útbúgving.
- hollar royndir innan leiðslu og fyrisiting.
- hava áhuga fyri bæði fakligari menning og starvsfólkamenning.
- góð samstarvsevnir.

Broytingar fara fram í sjúkrahúsverkinum, tí verður dentur lagdur á fleksibilitet, kreativitet og vilja og evnir at fremja broytingar.

Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Føroya landsstýri og Sjúkrasystrafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Mariu á Dul, fyristøðukvinnu, telefon 13540 lokal 127.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum skal sendast til

Sjúkrahússtjóran
postboks 366
110 Tórshavn

Umsóknarfreistin er 1. mars 1996.

Skrivari
til sjúkrahúsverkið

Søkt verður eftir skrivara til Deildina fyri Arbeiðs- og almannaheilsu/Sjúkrahússtjóran, at byrja skjótast tilber.

Neyðugt er við góðum kunnleika til telduarbeiði, føroyskt, enskt og almenna fyrisiting.

Uppgávurnar eru umframt alt vanligt læknaskrivara- og stjóraskrivaraarbeiði, serliga stýring og samskipan av granskingarætlanum.

Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Starvsmannafelagið.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Pál Weihe, yvirlækna - tlf. 16696.

Umsókn við avriti av prógvum verður at senda til **Sjúkrahússtjóran, Sigmundargøta 5, Postsmoga 366, 110 Tórshavn**

áðrenn 4. mars 1996.



Danir projektera og danir bora:

Sannlíkt at Mærsk skal bora í Lopra

Eftir øllum at døma verður tað danska oljufelagið Mærsk Drilling, sum fær stóru og spennandi uppgávuna at bora í Lopra í mai í ár. Sambart keldum, sum Sosialurin hevur tosað við, hevur danska felagið Danop, sum stendur fyri útbjóðingini av boriarbeiðinum, tikið av tilboðnum hjá Mærsk Drilling.

Jan Müller

Tilsamans sjey feløg eru við í kappingini um at bora í Lopra. Eitt av feløgunum er tað enska Kenting Drilling, eitt er borifelagið KCL, síðani hevur eitt íslendskt felag bjóðað og millum hini, sum hava søkt um arbeiðið er danska felagið Mærsk Drilling (Mærsk Contractors). Hetta er systurfelag hjá Mærsk Olie og Gass, og hoyra tey bæði so aftur til stóru AP Møller konsernina.

Mærsk Olie og Gas ongan áhuga

Tað var í fjør, at føroyska oljufyrisitingin tók stig til at kanna, um áhugi var fyri at fara undir aftur at bora í Lopra.

Úrslitið varð, at 18 av ialt 24 altjóða oljufeløgum, sum vóru á kunnandi fundi í Havn, søgdu seg vilja seta pengar í projektið.

Eitt av feløgunum, sum var við á fundinum, men sum ikki ynskti at vera við í verkætlanini var systurfelagið hjá Mærsk Drilling, nevniliga Mærsk Olie og Gas. Hetta hevði ikki teirra áhuga varð sagt aftaná.

Nú tykist tó systurfelagið, Mærsk Drilling at hava fingið blóð uppá tonnina og liggur eftir øllum at døma best fyri í kappingini.

Samlaða projektið er uppá einar 30 mill. kr. og av hesum er boriarbeiðið ein rættiliga stórur partur.

Eftir tí sum Sosialurin hevur fingið upplýst, so plagar Mærsk Drilling ikki at bora á landi. Hetta verður fyrstu ferð teir bora á landi í Europa. Keldur vilja vera við, at fyritøkan júst nú skal hava útvegað sær ein boripall fyri nettup at kunna fáa arbeiði í Lopra.

Willi Bruun frá Donop sigur við Sosialin, at enn er einki avgjørt, men hann váttar, at Mærsk Drilling er millum feløgini, sum vilja sleppa at bora í Lopra. Teir eru í løtuni við at kanna øll tilboðini og ein avgerð felur í næstu viku um, hvør skal fáa arbeiðið.

Uppá fyrispurning um Mærsk hevur fyrimunir í hesi útbjóðingini, tí fyritøkan er donsk sigur Willy Bruun, at tað fáa teir sjálvandi ikki. Hugt verður eftir, hvør er best førur fyri at taka sær av uppgávuni. Hann vísir annars á, at tað eru tey 18 oljufeløgini, sum skulu figgja projektið, sum koma at avgera, hvør skal fáa boriarbeiðið.

-Vit gera tær neyðugu kanningarnar og lata so okkara tilráðing og upplýsingar víðari til oljufeløgini.

Hvat viðvíkur "conspiratiónsteorinni" millum nógvar føroyingar um, at avtala onkursvegna er gjørd millum føroyskar og danska politikarar um, at dosnk feløg og har serliga Mærsk skal fáa framíhjárætt í menningini av eini oljuvinnu sigur Willy Bruun, at slíkt hevur hann ongar viðmerkingar til. At Danop sum danskt felag skal prioritera Mærsk fram um onnur feløg, tí tað eisini er danskt, heldur Willy Bruun vera heilt við síðuna av. - Ein og hvør veit t.d., at Danop og Mærsk hava ikk i havt nakað serliga gott samstarv.

Unfair kapping

Sosialurin hevur verið í sambandi við eitt av hinum feløgunum, sum hevur bjóðað uppá boriarbeiðið.

Umboð fyri hetta felagið sigur, at tað tykist sum at Danop longu hevur avgjørt, at Mærsk skal hava arbeiði.

-Vit kenna tað soleiðis, sum at talan er um eina "unfair" kapping, har danska felagið fær loyvi til at undirbjóða hini feløgini.

Hetta er stórt spell, tá hugsað verður um, at talan skuldi vera um eina heilt frí a kapping og tá ein veit, at fleiri av hinum feløgunum hava boðið sær til at lata ein stóra part av arbeiðinum verða gjørt av føroyingum.

Hetta er so heldur ikki nøkur góð byrjan hjá eini komandi føroyskari oljuvinnu sigur keldan við blaðið.

OYGGJA-BÓKASØLAN

Av endaliga lutakastinum 12. februar 1996 eru hesir vinnarar úttiknir:

Gávukort á 1.000,- kr.
Magnus Henriksen, Dr. Dahlsgøta 5, 100 Tórshavn

Gávukort á 500,- kr.
Maria Bech, 480 Skála

Gávukort á 250,- kr.
Sven Davidsen, 340 Kvívík

* * * * *

Gávukortini geva rætt til bøkur frá
Føroya Skúlabókagrunni
og/ella
Bókadeild Føroya Lærarafelags

Tillukku!